# Dagligur leiðari til pensjón og trygging

Eik



**Ábyrgdarøki og uppgávur**

Sum dagligur leiðari hevur tú ábyrgdina av teimum starvsfólkunum, ið starvast innan pensjónsøkið á Eik Markets. Arbeiðsstaðurin verður í høvuðssætinum Yviri við Strond í Havn. Tú vísir til leiðaran á Eik Markets, men fært dagligu ábyrgdina av at:

- menna nýggjar tænastur og hava samskifti við produktveitarar
- menna og coacha pensjónsumboðini úti í deildarnetinum
- tillaga pensjónsøkið til komandi nýskipanina av pensjónsøkinum í Føroyum
- viðlíkahalda og menna okkara íløgukonsept
- skipa fyri tøkniligu menningini av skipanum, ið eru tengdar at pensjóns- og tryggingarøkinum í Eik banka

**Fakligir førleikar:**

Vit vænta, at tú hevur áhuga fyri arbeiðsøkinum, og flair fyri tølum. Royndir og útbúgving innan pensjóns- og tryggingarøkið er ein fyrimunur, men ikki eitt krav.

**Persónligir eginleikar:**

Vit leita eftir einum starvsfelaga, har stutt er frá hugskoti til veruleika. Tú ert málsøkin og jalig/ur, hevur góð samstarvsevni og dugir at birta upp undir menningina av teimum starvsfólkum, tú hevur ábyrgdina av.

Áhugaði kunnu venda sær til Sverra Justinussen, leiðara á Eik Markets á tlf. 348611, teldupostur sverri.justinussen@eik.fo. Starvið verður sett skjótast gjørligt og verður lønt eftir avtalu. Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 26. oktober 2009, kl. 12.00 og skulu stílast til:

Eik Banki
Att.: Elin Sigvardsen, Starvsfólkaleiðari
Yviri við Strond 2
100 Tórshavn

Ella í telduposti til elin.sigvardsen@eik.fo

**Les meira um starvið á**
www.eik.fo

VASTI



# DEMOKRATIA Á FERÐ – fyrilestrar kring landið

DEMOKRATIA

**Mikukvøld er DEMOKRATIA-KVØLD. Fyri at kalla allar føroyingar. Tí nú fer Demokratia undir áhugavert tiltak, sum verður á skránni 3 mikukvøld í oktober og november. Talan er um fyrilestrar, ið verða hildnir á 6 ymsum støðum í Føroyum.**

Fyrilestrarnir viðgera evni, sum snúgva seg um javnstøðu í politikki, um demokrati og politisk rættindi og um aðrar spurningar, ið eru viðkomandi fyri arbeiðssetningin hjá Demokratiu, sum er økt javnstøða í politikki.

**Persónarnir, sum høvi verður at hoyra, og teirra fyrilestrar, eru:**

- **Hallbera West** heldur fyrilesturin *Tá politisk rættindi ikki eru nokk*
- **Bjørt Samuelsen** heldur fyrilesturin *Tora vit at vilja valdið? Um at gera seg galdandi á politiska vígvøllinum og vera sjónlig í fjølmiðlunum og í almenna rúminum.*
- **Sámal Matras Christiansen** heldur fyrilesturin *Javnstøða fyri øll? Ella bara fyri Yuppie kvinnur? Tríggjar hypotesur um javnstøðu*
- **Halgir Winther Poulsen** heldur fyrilesturin *Um demokrati sum hugtak*
- **Sonja Jógvansdóttir** heldur fyrilesturin *Javnstøða í tómgongd*
- **Elin Mortensen** heldur fyrilesturin *Hava vit ikki javnstøðuí Føroyum?*
- **John Dalsenni Olsen** heldur fyrilesturin *Kvinnur og menn – fólkaræði og sannleiki*

**Støðini, har fyrilestrarnir verða hildnir, eru:**

- **Suðuroy:** Skúladepilin í Hovi, kantinan
- **Sandoyggin:** Skúlin á Sandi
- **Vágar:** Skúlin á Giljanesi
- **Streymoy:** Søgu- og samfelagsdeildin, J. Broncksgøta 25, 4. hædd
- **Eysturoyggin:** Handilsskúlin á Kambsdali
- **Norðuroyggjar:** Tekniski skúlin í Klaksvík

**Fyrilestrarnir verða hildnir mikukvøldið 28. oktober, mikukvøldið 11. november og mikukvøldið 25. november. Tiltøkini byrja klokkan 19.30 og vara umleið ein tíma.** Ein fyrilestur verður á hvørjum staði.

**Tiltøkini eru almenn og ókeypis. Eisini verður høvi hjá áhoyrarunum at seta spurningar.**

**Skráin 28. oktober 2009**

- **Klaksvík:** *Javnstøða í tómgongd* **(Sonja Jógvansdóttir)**
- **Kambsdalur:** *Javnstøða fyri øll? Ella bara fyri Yuppie kvinnur? Tríggjar hypotesur um javnstøðu* **(Sámal Matras Kristiansen)**
- **Tórshavn:** *Tora vit at vilja valdið? Um at gera seg galdandi á politiska vøllinum og vera sjónlig í fjølmiðlunum og í almenna rúminum* **(Bjørt Samuelsen)**
- **Vágar:** *Tá politisk rættindi ikki eru nokk - Fyrilestur um fólkaræði og kvinnuliga politiska luttøku* **(Hallbera West)**
- **Sandur:** *Um demokrati sum hugtak* **(Halgir Winther Poulsen)**
- **Suðuroy:** *Hava vit ikki javnstøðu í Føroyum?* **(Elin Mortensen)**

SONJA

SÁMAL

HALGIR

HALLBERA

ELIN

JOHN

BJØRT


DEMOKRATIA

**Lesið meira um fyrilestrahaldararnar og um skránna fyri tiltøkini á www.demokratia.fo**